# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Færøernes Mellem- og Realskole:

## Fimleikur á »tennisplenuni« í 1959



Nú nærkast tíðin, tá framsýningin av millum- og realskúlanæmingum hjá Jórunn Dánjalsdóttir fer av bakkastokki um ólavsøkumundið. Framsýningin verður í Kommunuskúlanum í Havn og letur upp við eini kvøldsetu tann 23. juli kl. 19.00 har fyrrverandi næmingar koma at hugleiða um tíðina, tá tey gingu í skúla.

Hendan myndin er av millum- og realskúlaflokkunum í 1959. Marsjerað var gjøgnum býin og niðan á "tennisplenuna". Tað var fimleikalærarin Martin Holm, sum skipaði fyri hesum tiltakið.

Klaverið hjá frú Holm (Kirsten Holm, kona Martin Holm) varð "bugserað" niðan á tennisplenuna og stóð í einum horni, har hon sjálv spældi til fimleikaseriuna, sum var framførd.

Tennisplenan er har, sum Svimjihøllin í Gundadali er í dag. Leggið til merkis húsini og bilarnar, tveir Morris Minor last-og vørubilar, ein Austin vørubilur og fremst er ein Ford Consul persónbilur (í tveimum litum). Húsini á høvdini, har orgulbyggjarin Verland Johansen hevði verkstað og Dramaverkstaðurin er í dag, er einasta húsið sum er har í dag.

Jórunn eftirlýsir í hesum sambandi nakrar myndir, sum vóru sýndar fram í sýnisglugganum í handlinum hjá Andori Eirikstoft í Magnus Heinasonargøtu (har sum Manhattan er í dag). Myndirnar vóru frá hesum tiltakinum á tennisplenuni.

Annars sigur Jórunn, at henni vantar enn fleiri realskúlamyndir, serliga frá síðst í 50-unum og fyrst í 60-unum. Tíðarfreistin til at koma við myndum var sett til 10. juni, og vónar hon at fáa allar myndirnar til høldar.

Adressan hjá Jórunn Dánialsdóttir er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Tel. 316024 ella 226024. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

*Myndaeigari: Ásvør Sandoy*

**Óli Mikkelsen 80 ár**
Í dag, mánadagin 11. juni, fyllir Óli Mikkelsen, lækni, í Tórshavn, 80 ár. Í blaðnum í morgin hava vit eina heilsan til Óla.

†

### Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Helga Einarsson, Tvøroyri**, vanliga nevndur Lilleba, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar Kirkju týsdagin kl. 13.

**Hans Jacob Sigvardsen** lærari, ættaður frá Gjógv, búsitandi á Argjum, andaðist sunnudagin 10. juni, 68 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Samulina Jensen, Skála**, ættað av Strondum, andaðist á Landssjúkrahúsinum 8. juni, 93 ára gomul. Jarðarferðin verður týsdagin kl. 14 úr kirkjugarðskapellinum í Tórshavn. Sungið verður úr sálmabókini.

Kistan við **Ragnar Antoniussen í Fuglafirði** kemur í Siloa í dag kl. 16. Jarðarferðin verður í morgin 12. juni kl. 14.

**Leif Nielsen**, sonur Poul Morell Nielsen og Ruth Smith, andaðist fríggjadagin 8. juni, 60 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin 16. juni úr Lille Kapell, Vestre kirkegård Århuus.

†

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma og omma okkara

**Sylvia Gunnarsson**
Tórshavn

andaðist leygardagin 9. juni, 83 ára gomul.
Farið verður úr Heiminum við Vallalíð týsdagin kl. 17.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin kl. 14.

*Familjunnar vegna*
**Eirikur, Ingunn, Randi og Victor**

Tey, ið vilja minnast Sylviu, kunnu lata eina gávu til Zarepta.
Kontur í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Olfert Fossaberg**
Stykkið

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til Hera Joensen, prest, kirkjutænarar, sangarar og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Margith, Lis og Gudny**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, omma og vermamma

**Jytta Palma Sofía Schrøter**
Hvalba

andaðist og varð jarðað.
Takk til Jette Paarup, prest, fyri góð orð í kapellinum og í kirkjuni. Takk til kirkjutænarar og sangarar.
Takk til tykkum øll, ið hjálptu so væl til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir, uppringingar og peningagávur til eldrasambýlið í Hvalba.
Ein serstøk takk til starvsfólk og búfólk á eldrasambýlinum í Hvalba.
Takk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Maja, Judi, Mami og Róin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu , tá kæra mamma, omma, vermamma og langomma okkara

**Maria Olsen**
(vanliga nevnd Mia)
Sandavágur

andadist og fór til gravar.
Tøkk til Ellisheimið fyri tíðina hon var har.
Tøkk til Ingu Dam, prest, kirkjutænarar, sangarar og gravarar.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til í samband við jarðarferðina. Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Sandavágs kirkju.
Tøkk til tykkum øll , sum fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Familjunnar vegna*
**Sólrún, Oddvør, Jógvan, Jóhan, Sigrún, Rannvá og Petur**

**Dagurin**
**12. juni. Basilius**. Helst til minnis um Basilius tann Stóra, sum var biskupur í Kesarea. Hann doyði í 379.